# Toskurin á Føroyabanka

Eyðfinn Magnussen

Fróðskaparsetur Føroya




Føroyabanki er umleið 75 km í ein útsynning úr Suðuroynni.  Bankarennan skilir Føroyabanka frá Landgrunninum. Hendan rennan er umleið 20 km breið og 850 m djúp. Rákið á Bankanum er soleiðis háttað, at sjógvurin í stóran mun heldur seg inni á Bankanum. Tí er Føroyabanki ein sjálvstøðug vistfrøðilig skipan, har umhvørvið hevur sett síni serstøku eyðkenni á fleiri fiskasløg og aðrar livandi verur, ið har liva. Kendast av hesum er helst bankatoskurin.

## Botnurin




Skeljasandur og sandur fjala stóran part av botninum á Føroyabanka.

## Vakstrarlag hjá toski




Miðalvekt á 3-ára gomlum toski veiddur ymsastaðni á havleiðum kring Føroyar.

## Støddin á føroyabankafiski samanborið við aðrastaðni




Føroyabanki er kendur fyri sín stóra tosk. Toskurin á Føroyabanka veksur serliga skjótt tey fyrstu árini, áðrenn hann gerst kynsbúgvin sum trý ára gamal. Hann er tá einar 75 cm til longdar. Eftir hetta minkar vøksturin og líkist tí, vit kenna frá toskinum á Landgrunninum. Samanborið við vøksturin hjá toski frá 18 øðrum toska-stovnum í Norðuratlantshavi, var 3 ára gamal føroyabankatoskur dupult so stórur, sum toskurin í hinum stovnunum.

Eisini onnur fiskasløg, sum eru “fastbúgvandi” á Bankanum vaksa skjótt í mun til tað, vit kenna aðrastaðni frá.

## Føðin




Føðin hjá toskinum á Føroyabanka er mest nebbasild og høgguslokkur. Summi ár kunnu krabbadýr tó eisini vera ein munandi partur av føðini. Føðin broytist tó frá einum ári til annað, bæði í nøgd og samanseting. Eisini kann parturin av tómu magunum vera rættuliga skiftandi.

## Hitin við botnin




Um várarnar er hitin við botnin á tí grunna (<150 m)  einar 7-8°C, um heystið umleið 10-11°C. Hetta er 1-2 °C heitari enn á Landgrunninum.